

# Wozniacki í hálvfinaluni

17 ára gamla amerikanska sensatiónin í tennis við US Open, Melanie Oudin, kundi einki gera við donsku Caroline Wozniacki, sum vann fjórðingsfinaluna 6-2 6-2. Bert í byrjanini av øðrum setti var eitt sindur av spenningi í, tá Oudin helt egnari serv til 2-3, men so streyk Caroline avstað og vann settið trygt. Melanie Oudin hevur annars staðið seg ótrúliga væl undir US Open, og hevur undan fjórðingsfinaluni sligið fýra russiskar stjørnur út. Hon var undan kappingini nummar 70 á styrkislistanum, men tað er eingin ivi um, at hon flytir fleiri pláss fram eftir góðu úrslitini. Caroline Wozniacki er í løtuni nummar 8 á styrkislistanum, men man hon ikki eisini fara at toga seg eitt pláss fram ella bæði tvey eftir síni góðu úrslit. Caroline Wozniacki møtir í hálvfinaluni belgisku Yanini Wickmeyer. Í hinari hittast Serena Williams og Kim Clijsters.



Arnbjørn Hansen hevur sett høvdið á bóltin, og so eru Føroyar á odda 2-1

Mynd: Álvur Haraldsen

# Arnbjørn avgjørdi

**Arnbjørn T. Hansen, sum var toppskjútti í føroysku fótbóltskappingini í fjør, vísti á Svangaskarði í gjárkvøldið, at hann framvegis er maður fyri at finna málið**



Hilmar Jan Hansen

Eftir eitt marathon-álop á lettiska málið, har talan fyrst var um eitt innkast og síðani trý framúr góð hornaspørk frá Jákupi á Borg, eydnaðist Arnbjørn at enda at seta høvdið á bóltin og skora til 2-1, ið skuldi vísa seg at gerast sigursmálið, nú Føroyar fyri fyrstu ferð í átta ár vunnu ein dyst í einari undankapping.

– Hetta er fantastiskt, og tað er veldugt at vera við til eina slíka uppliving, segði Arnbjørn beint eftir dystin, ið var hansara bara nummar seks í røðini. Samstundis kunnu vit frøast um, at vit síðstu tveir dystirnar hava fingið tveir nýggja landsliðsmálskjúttar.

Arnbjørn, sum ikki var við í Eysturríki, men fekk møguleikan, nú nýggir mans skuldu kallast inn, tí tríggir høvdu karantenu, var eisini sera fegin um umstøðurnar, nú hann fekk sítt fyrsta mál á A-landsliðnum:

– Tað var serliga stuttligt at skora sítt fyrsta A-landsliðsmál undir hesum umstøðunum. Hetta var bara fantastiskt, segði kollfirðingurin, sum í seinna hálvleiki læt seg skifta út, tá hann hevði runnið og tuskað so nógv, at battaríini vóru fullkomuliga fløt.

# Tí spæla vit á Svangaskarði



**Føroyar hava ikki ráð at geva avkall upp á nakran sum helst lítlan fyrimun, um vit skulu hava nakran kjans í altjóða høpi**

ÍTRÓTTARKLUMMAN

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað kann væl vera, at eitt landsstadion eigur at liggja í høvuðsstaðnum. Og tað kann eisini væl vera, at tað er eitt sindur bygdasligt at spæla uppi á einum fjalli, har bóltdreingirnar kunnu risikera, at bólturin fer fleiri hundrað metrar burtur, tá hann verður sparkaður av vøllinum.

Og tað kann eisini væl vera, at tað er ein hypotesa at tosa um, hvussu Litava-dysturin endaði, um hann varð spældur á Tórsvølli.

Men tað er eitt faktum, at føroyska A-landsliðið hagtalsliga hevur staðið seg betur á Svangaskarði, enn liðið hevur gjørt tað á Tórsvølli, og tað eru tað fleiri heilt góðar orsøkir til.

Fyrst og fremst er tað vøllurin sjálvur. Hvør metur, sum skal rennast minni í altjóða dysti vil at kalla altíð vera ein fyrimunur hjá okkara monnum. Størsta partin av mest sum øllum landsdystunum brúka okkara til at jagstra mótstøðuna og tetta hol í verjuni, tá ger tað góðan mun, um metrarnar millum spælararnar eru færri.

Í álopspartinum dúva vit fyri tað nógva upp á kontra í mest sum øllum dystum, og eisini har er tað munin lættari, um fjarstøðan niðan til mótstøðumálið er 50 heldur enn 60 metrar.

Og so eru tað sjálvandi kringstøðurnar annars. Fyri útlendskar fótbóltsstjørnur man vøllurin á Toftum vera eitt tað løgnasta staðið, sum tú kanst ímynda tær at spæla á. Gott nokk er heitt vatn í, brúsuni og hondvask er á WC'inum, men í aðrar mátar er einki soleiðis, sum teir eru vanir við.

At kalla allir lutir siga mótstøðuni, at nú eru teir á útivølli, og hvør einasti lítil smálutur av hesum slag, telur tí til okkara fyrimun. Og fyrimunir eru absolutt ikki nakað, sum vit hava ráð til at geva avkall uppá, um vit skulu standa okkum á altjóða pallinum.

Føroyar eru ikki meira enn ein lítil bygd í Europa. So sjálvandi skulu vit virka bygdaslig hjá stóru londunum at vitja.

# Dreymurin gekk út



Mynd: Álvur Haraldsen

**Eftir ætlan stendur Jákup Mikkelsen í føroyska málinum tvær ferðir afturat . Dysturin mikukvøldið var seinasti heimadystur**

Jákup Mikkelsen spældi í gjárkvøldið sín landsdyst nummar 65, og eftirsum hann hevur boðað frá, at hetta er hansara seinasta ár sum landsliðsmálverji, var dysturin á Svangaskarði samstundis hansara seinasti heimadystur fyri Føroyar.

– Hetta er tað, eg havi droymt um, og næstan ikki trúði fór at gerast veruleiki. Eg eri rørdur og ótrúliga takksamur fyri hetta, segði Jákup beint eftir dystin, tá hann samstundis var eyðmjúkur og vildi rósa monnunum framman fyri sær, heldur enn at taka til takkar við heiðrinum sjálvur:

– Tað var stuttligt at spæla við einari so fantastiska góðari verju framman fyri sær, sum serliga tók sær av øllum í luftini, tí í veruleikanum fór eg skeivur av fleiri bóltum, segði Jákup Mikkelsen.

– Tað er ótrúliga deiligt at kunna takka fyri seg á heimavølli upp á henda mátan. Hetta var heilt fantastiskt!

*-hil*